## Hiti og bjálving í vetur

Í **Oyggjablaðnum** mikudagin seta vit fokus á hita og bjálving Í hesum blaðnum kanst tú millum annað lesa hetta:

- Populer passiv-hús í Noregi



- Marjus Dam valdi føroysku loysnina



- Heimsins grønasta gistingarhús




- Jarnhold hitar húsini við berghita



- Baldvin berjist ímóti hitalekum



- Góð ráð um orkusparing

og mangt annað áhugavert tilfar.




*Longu leygarmorgunin var Rólant klárur aftur og kundi veittra til foreldrini*

# Klaksvíksdrongur fingið nýtt hjarta

## 14 ára gamli Rólant Reginsson Biskopstø hevur tað gott, eftir at hann leygarnáttina fekk nýtt hjarta

Randi Jacobsen

Søgan um Rólant Reginsson Biskopstø úr Klaksvík er ein sólskinssøga. Hann liggur á Ríkissjúkrahúsinum, hevur fingið nýtt hjarta, og skurðviðgerðin gekk væl.

Alt byrjaði við, at hann fjørsummar fekk hann krím og slapp ikki av aftur við hostan. Hann varð so kannaður, og tað vísti seg, at hann hevði ov stórt hjarta.

Hann fekk nógvan heilivág, men læknarnir søgdu, at hann noyddist at fáa nýtt hjarta.

30. oktober fóru Rólant og foreldrini Jórun Biskopstø og Regin Simonsen til Danmarkar.

Tey gjørdu seg út til at skula bíða eftir nýggjum hjarta til Rólant í nøkur ár, men longu fríggjadagin seinnapartin ringdi Ríkissjúkrahúsið og segði teimum, at eitt hjarta var til Rólant.

### Gekk væl

Fríggjakvøldið varð Rólant so lagdur undir skurð, og um náttina var skurðviðgerðin liðug.

Alt gekk væl, og longu leygarmorgunin var Rólant, sum lá í respiratori, vakin aftur, skrivar Norðlýsið.

Sunnumorgunnin varð hann tikin úr respiratorinum, hann fær etið og hevur onga pínu.

Upp undir skurðvigerðina fekk hann nógvan heilivág, sum nú verður trappaður niður.

Familjan má rokna við at búgva í Danmark næsta hálva árið. Tað er væl sloppið, tá hugsa verður um, hvussu leingi onnur noyðast at bíða.

### Má verjast

Enn sleppa onnur enn foreldrini ikki at vitja Rólant, sum má verjast móti smittuvanda.

Norðlýsið hevur tosað við mammuna, sum greiðir frá, at komandi tíðin kann gerast strævin, tí roknast kann við afturstigum.

Sosialurin royndi í morgun at fáa orð á Jórun Biskopstø, men hon hevði ikki stundir tá at tosa.

Annars hevur Rólant gjørt sær eina heimasíðu, sum hann hevur skrivað søgu sína á.

*http://www.123hjemmeside.dk/biskopstorolant/40416458*



*Tað er ein stór skurðviðgerð, sum 14 ára gamli Rólant hevur verið igjøgnum*